# Kapprenning millum fartelefonveitarar



**Hvør kemur fyrst Alnót ella TeleF? Tað er tann stóri spurningurin í føroysku fjarsiftisvinnuni, nú TeleF sum tann triðja telefyritøkan í landinum hósadagin fekk loyvi at veita GSM fartelefontænastur. Pláss er í hvussu er fyri tveimum veitarum á marknaðinum, men spurningurin er, um pláss eisini er fyri tí triðja**

FJARSKIFTISKAPPING

*Rúnar Reistrup*

Hósdagin fekk føroyska partafelagið TeleF sokallaða koncessión, ella loyvi, at reka fartelefoni í Føroyum. Tað er ikki meira enn ein vika síðan, at partafelagið Alnót fekk líknandi loyvi, og nú eru sostatt tríggjar fyritøkur, ið kunnu veita føroyingum fartelefontænastur. Tann triðja er Føroya Tele, sum í løtuni er einsamøll á marknaðinum fyri fartelefoni.

Telefyritøkurnar Alnót og TeleF stíla báðar eftir at veita høvuðsstaðarøkinum, Klaksvík og meginøkinum í Eysturoynni fartelefontænastur av egnum kervi í seinasta lagi í summar.

Tá hetta er hent metir Jógvan Thomsen, leiðari á Fjarskiftiseftirlitinum, at marknaðurin longu er mettaður.

– Eftir mínari meting er tað er væl pláss fyri tveimum, og møguliga pláss fyri trimum veitarum á føroyska marknaðinum, men so neyvan fleiri, sigur leiðarin á Fjarskiftiseftirlitinum, sum umframt at hava eftirlit við marknaðinum, eisini er tann stovnurin, sum viðgerð umsóknir um fjarskiftiskoncessiónir og gevur Vinnumálastýrinum tilráðingar.

## Undirveitarar avgerandi

Spurningurin er so hvør av teimum báðum nýklæktu GSM fartelefonveitarunum, ið kemur fyrst inn á marknaðin.

Sambært Svein Askildsen, marknaðarleiðara á TeleF, er hetta í stóran mun ein spurningur um, hvussu skjótt undirveitararnir hjá fyritøkunum báðum kunnu lata útgerðina. Bæði Alnót og TeleF hava boðað frá, at fyritøkurnar í fyrsta lagi ætla at gera íløgur fyri 30 milliónir í GSM skipanir sínar.

– Eg trúgvi neyvan at fyritøkurnar á føroyska fartelefonmarknaðinum kundu funnið uppá at bílagt útgerð fyri 30 milliónir, áðrenn tær vóru vísar í at fáa loyvi, so á tann hátt byrja vit ájavnt við okkara kappingarneyta, sigur marknaðarleiðarin á TeleF, og sipar her til Alnót, sum fekk sítt loyvi at veita fartelefontænastur í farnu viku.

Svein Askildsen sigur, at á TeleF undirmeta tey ikki týdningin av at vera tann fyrra av teimum báðum fyritøkunum á marknaðin fyri fartelefontænastur. Men hann væntar tó, at pláss er fyri trimum fyritøkum á føroyska fartelefonimarknaðinum, um hesin fer at vaksa eftir sama mynstri sum í granalondum okkara. Hann ivast tó stórliga í um tað er pláss fyri einum fjórða veitara og væntar ikki fleiri kappingarneytar.

## Gerast ikki fleiri

Sum tað sær út nú, koma tað heldur ikki fleiri veitarar á marknaðin í bræði. Vinnumálastýrið fekk nevniliga einans tvær umsóknir um koncessiónir at reka GSM fartelefontænastur, og tær eru nú báðar gingnar á møti. Tað er sambært stjóranum á Fjarskiftiseftirlitinum lítið sannlíkt at tað yvirhøvur koma fleiri.

Hvørki stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum ella marknaðarleiðarin á TeleF høvdu væntað, at stóru fleirtjóða telefyritøkurnar fóru at søkja um GSM loyvir í Føroyum.

– Føroyski marknaðurin er so lítil í mun til aðrar, at tað er ikki so attraktivt hjá teimum stóru útlendsku fyritøkunum at koma inn á hann, sigur Svein Askildsen, marknaðarleiðari á TeleF.

Hóast tær báðar nýggju telefyritøkurnar Alnót og TeleF báðar eru føroyskar, so eru útlendskar telefyritøkur við í spælinum. Íslendska Íslandssími eigur helvtina av TeleF, og Alnót samstarvar við svensku telefyritøkuna Telia Swedtel.

## TeleF fyrst á fastnetið

TeleF var ein av teimum fyritøkunum, sum í fjør fingu koncessión til at veita fjarskiftistænastur yvir fasta netið, og 14. desember trein fyritøkan alment inn á marknaðin fyri fastnettelefoni.

TeleF hevur farnu vikurnar skrásett viðskiftafólk til fastnettænastu sína. Hendan fyrsta tíðin hevur mest av øllum verið eitt royndarátak, men fyrsta dagin fer fyritøkan undir at marknaðarføra fastnettænasturnar.

Prísurin at ringja innanlands við TeleF fastnethaldi er ellivu prosent lægri en prísirnar hjá Føroya Tele. Hetta merkir, at tað er 4 oyru bíligari at ringja innanlands um dagin og 2 oyru bíligari um kvøldi og náttina. Telefonsamrøður til fartelefonir eru 10 oyru bíligari um minuttin við fastnettelefonhaldinum hjá TeleF.

# Leita framvegis eftir venjara



**Formaðurin í Kyndli roknar við, at kvinnurnar hjá felagnum hava fingið nýggjan venjara fyrsta dagin**

HONDBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*

Kvinnuliðið hjá Kyndli manglar framvegis venjara.

Eftir at Birgir Hansen legði frá sær fyri jól, hevur Kyndil leitað eftir nýggjum venjara til kvinnuliðið.

– Tað er trupult at finna ein hóskandi venjara, men vit vóna, at venjarin er funnin í dag ella í morgin, segði Ellindur Egilstrøð við Sosialin í gjár.

Fleiri uppskot hava verið frammi um venjara, millum annað at Lotte Sørensen skuldi vera spælandi venjari, men hetta verður av ongum.

Kvinnurnar hjá Kyndli hava ikki staðið seg serliga væl í kappingini í ár, hóast tær hava fleiri landsliðsspælarar á liðnum. Kyndil er í løtuni langt frá gullstríðnum, sum felagið gjarna vil verða við.

# Norðbúð upp á tal í Klaksvík

KÍ skal hava nýggjan hjálparvenjara til komandi kappingarár, og sambært lokalblaðnum Norðlýsinum er Jógvan Norðbúð upp á tal til hetta starv.

Jógvan Norðbúð, sum er ættaður úr Klaksvík, hevur drúgvar royndir sum venjari, og tá núverandi KÍ-venjarin, Tomislav Sivic, var venjari í B36, arbeiddi hann tætt saman við Jógvan Norðbúð.

Tomislav Sivic heldur fram í Klaksvík í eitt ár afturat, og nú er møguleiki fyri, at Jógvan Norðbúð skal vera hansara næsti maður.

Seinasta kappingarár hevði Bill Jacobsen hesa uppgávuna, men hann heldur ikki fram. Bill hevur aðrar uppgávur í KÍ, og hann er eisini ein av landsliðsvenjarunum hjá Fótbóltssambandinum.

Tomislav Sivic kemur til Klaksvíkar aftur síðst í hesum mánaðinum, tá venjingin hjá besta liðnum av álvara byrjar aftur.

Vikuskifti

Nr. 4 • leygardagur • 6. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Mikkjal Helmsdal:

**Tað norðurlendska stóran leiklut hjá smátjóðum**

síða 16-17



**KLASSIKARI. Í føroyskari plátusøgu eru tveir klassikarar, metir Birgir Kruse. Teir eru “Vælferðarvísurnar” hjá Kára P frá 1978 og LP-plátan við Faroe Boys frá 1967. Nú eru hesir báðir klassikarir tøkir á fløgu frá Tutl**




*Upprunaligi plátuhúsin frá 1967 – í stereo!*

# When we dance to the Faroe Boys

*Birgir Kruse*

Góða, gamla LP-plátan við teim 11 sangunum hjá Faroe Boys er nú tøk á tíðarrættari fløgu. Eini kærkomin nýggjárstíðindi, nú so langt er millum plátuspælararnar og fløguspælari man vera í hvørjum húsi. Serliga stuttligt at hava sangin “That’s how” við hondina. Ein nógv nýttur felagssangur á mínum arbeiðsplássi.

Upprunaliga kom Faroe Boys-plátan í 1967 í 1500 eintøkum og varð uppseld eftir stuttari tíð. Nú plátufelagið Tutl gevur hana út av nýggjum, eru upptøkurnar nett tær somu.

Men eftirsum upprunabandið - masterbandið - við søguligu upptøkunum fór upp í royk í einum eldsbruna í Danmark, hevur Jónsvein Heinesen útvarpsteknikari funnið eitt gott eintak av klassisku LP-plátuni og soldað alt óljóð frá. Eftir stendur ein rein upptøka, meinlík hinari gomlu.

Einki er at taka seg aftur í, at plátan við Faroe Boys er ein klassikari. Klassikari so at skilja, at hon er ein greið og klár tíðarmynd. Tí einki kann sum plátan – ella nú fløgan – fevna um tíðarandan og goyma samtíðina.

Hetta fyribrigdi kallar danski miðlagranskarin Birgitte Tufte ein seismograf. Hon vil verða við, at einki kann sum rokktónleikur lýsa samtíðina og samfelagsligu byltingarnar. Besti seismografur er rokkplátan, metir hon.

Ein annar av donsku granskarum á hesum øki er Birgitte Holm Sørensen, deildarleiðari á Lærda danska námsfrøðiliga stovninum, sum áður nevndist Danmarks Lærerhøjskole. Hon vil verða við at rokktónleikur er týðandi táttur í uppfostranini og tí at skapa egnan samleika – identitet. Hon hevur granska børn og ung og hvussu tey nýta dagsins tónleik í spølni og í læru, reseptivt, produktivt og interaktivt, sum hon sjálv málber seg.

So nú hava vit eisini granskingarlig, haldbar orð fyri, at tann rokktónleikur vit uppliva í okkara samtíð er bæði borðbarur og týdningarmikil. Men sjálvandi, tað er tað so nógva annað sum eisini er.

Plátufelagið Tutl eigur tøkk uppborna fyri at hava gjørt hesar klassisku upptøkur við Faroe Boys atkomuligar hjá okkum, meiri enn eitt ættarlið eftir at tær vórðu til. Ein virðismikil tíðarmynd, eins og *hin* klassiska útgávan, sum Tutl fór undir í 1991. Tað var tá “Vælferðarvísur” hjá Kára P vórðu endurútgivnar á fløgu. Tann upprunaplátan kom í 1978.

So nú kunnu vit fegnast um at tvær tær ovastu pláturnar í rútmiska føroyska tónleikavarðanum eru tøkar á fløgu.

Og meðan dansurin gongur, kunnu vit lesa um Dansifrøi á síðu 18 og 19.




*- Ein annar klassikari: “Vælferðarvísur” hjá Kára P frá 1978, sum Tutl gav út á fløgu í 1991*